# Klæmint Weihe heldur fram í Norðoyatunlinum

**Hóast hann fekk gegnistrupulleikar í sambandi við Vágatunnilin, fer SEV stýrið ikki at krevja, at Klæmint Weihe tekur seg úr evndini fyri Norðoyatunnilin**

GEGNISTRUPULLEIKAR
*Áki Bertholdsen*



Tað verður ikki neyðugt hjá Klæmint Weihe, stjóra í SEV, at taka seg úr nevndini fyri Norðoyatunlinum.

Poul Arni Jacobsen, formaður í SEV stýrinum, sigur, at hóast Klæmint Weihe fekk gegnistrupulleikar í sambandi við Vágatunnilin, fer SEV stýrið ikki at krevja av honum, at hann skal siga seg úr nevndini fyri Norðoyatunlinum.

Annars gjørdi formaðurin í Umboðsráðnum hjá SEv, Hans Tausen Olsen, greitt í Degi og Viku mánakvøldið, at hann vildi hava SEV stjóran úr nevndini fyri Norðoyatunnilin.

Men formaðurin í SEV stýrinum sigur, at setanartreytirnar hjá stjóranum eru eitt stýrismál og stýrið krevur ikki, at hann skal taka seg úr nevndini.

– Stjórin hevur fingið eina átalu frá SEV stýrinum og har liggur málið.

Annars er tað ikki SEV stýrið sum ger av, hvørji hjástørv Klæmint Weihe hevur. Í hesum føri er tað politiski myndugleikin, sum hevur valt hann í stýrið og Klæmint Weihe sjálvur, sum hevur tikið av.

*Tað verður ikki neyðugt hjá SEV stjóranum at taka seg úr nevndini fyri Norðoyatunlinum*

Men hereftir verður tað so, at limir í leiðsluni í SEV skulu hava loyvi frá stýrinum fyri at kunna átaka sær hjástørv og teir, sum eru í nevndum, skulu hava loyvi frá stýrinum undan hvørjum aðalfundi.

Poul Arni Jacobsen heldur, at nú er tað gjørt stjóranum greitt, at øll mál hjá SEV, sum hava við undirsjóvartunnilin at gera, eiga at verða løgd fyri SEV stýrið til støðutakan og tað verður tað sama í sambandi við Norðoyatunnilin.

– So fáa vit trupulleikar av hesum slagi aftur, skal tað undra meg nógv.

Annars heldur stýrisformaðurin, at Sev stýrið má nú eisini viðgerða málið um at gera greiðar mannagongdir, tá ið starvsfólk hjá SEV kunnu koma í gegnistrupulleikar av ymsum slagi.

– Men eitt er at taka seg úr einum máli vegna gegnistrupulleikar. Men gegnistrupulleikar skulu heldur ikki kunna brúkast sum umbering fyri at sleppa undan at taka eina ódámliga avgerð, so málið vendir báðar vegir.

– Tað er eisini ein fyrimunir hjá starvsfólkinum sjálvum at vita, hvat tey hava at halda seg til.

SEV stjórin sigur eisini, at ein grundleggjandi spurningur, sum má viðgerast, er, í hvønn mun SEV skal samstarva við onnur.

Samstarv við Føroya Tele, Landsverkfrøðing, kommunur, og onnur, hava verið gagnlig. Eitt nú er eitt slíkt samstarv við til at forða fyri, at vegir verða grivnir upp óneyðuga ofta, sum var ein stórur trupulleiki fyrr. Og eitt slíkt samstarv tryggjar eisini, at rættar tekniskar loysnir verða valdar í nógvum førum, har SEV hevur sakkunnleikan. Og spurningurin er eisini nær málini verða so stór, at tey skulu leggjast fyri stýrið.

– Spurningurin um, hvussu langt SEV skal fara er ein viðgerð, sum SEV má takast upp, sigur Poul Arni Jacobsen.

Sí eisini greinina »Stjórin í SEV fingið átalu«.

# Stjórin í SEV fingið átalu

**Klæmint Weihe var ógegnigur, tá ið hann var við til at viðgera málið um at keypa neyðaggregat til Vágatunnilin. Men hóast hann ikki var við, hevði úrslitið neyvan verið øðrvísi**

GEGNISTRUPULLEIKAR
*Áki Bertholdsen*



*Tvístøðan hjá Klæmint Weihe sum stjóri í SEV og nevndarlimur í Vágatunlinum, hevur nú kostað honum eina átalu*

Klæmint Weihe, stjóri í SEV, hevur nú fingið átalu frá stýrinum fyri SEV.

Átaluna fær hann, tí mannagongdin var ikki nøktandi, tá ið SEV keypti eitt neyðaggregat til Vágatunnilin.

Klæmint Weyhe er nevniliga ógegnigur í hesum málinum, tí umframt at vera stjóri í SEV, er hann eisini nevndarlimur í Vágatunlinum.

Og tí átti hann als ikki at tikið lut í innanhýsis viðgerðini í SEV, tá ið elfelagið keypti neyðaggregatið til Vágatunnilin.

Eftir at fjølmiðlar høvdu reist iva um mannagongdina, tá ið neyðaggregatið varð keypt, tók SEV stýrið málið til viðgerðar.

SEV stýrið er komið til tað niðurstøðu, at av tí at SEV stjórin hevði gegnistrupulleikar í hesum máli, átti tað at verðið lagt fyri stýrið.

Men tað hendi ikki og tí fær SEV stjórin átalu frá stýrinum.

## Neyvan verið øðrvísi

Annars vísir skrivstovustjórin í SEV, J. P. Danielsen, í einum innanhýsis notati á, at hóast SEV stjórin ikki hevði tikið lut í viðgerðini, hevði niðurstøðan neyvan verið øðrvísi.

– Allar avgerðir í hesum máli hjá SEV eru tiknar í samráð við stjóran. Hansara ógegni átti at viðført, at hann ikki luttók í málsviðgerðini, sigur J. P. Danielsen.

Hinvegin er saksviðgerðin framd av sakkønum fólki á Maskindeildini, og skrivstovustjórin metir ikki, at úrslitið av málinum hevði øðrvísi, um stjórin ikki hevði verið við í málsviðgerðini, leggur hann afturat.

Hann vísir á, at bæði kommunur, almennir stovnar og privatar fyritøkur hava mangan brúkt serkunnleikan hjá SEV tá ið ymisk útgerð skal útvegast og tað hava tey betalt fyri, eins og SEV hevur havt ein lítlan vinning av tí.

Í notatinum nevnir hann fimm dømi um, at SEV hevur keypt útgerð til ymsar stovnar og feløg. Tað hendi í sambandi við Vágatunnilin í 1989, í sambandi við Sumbiarbergholið, Kaldbaksbergholið, Flogvøllin og Føroya Tele, men men hetta eru bara fimm dømi burturúr úr eini rúgvu.

Hann sigur, at hesi mál eru ikki løgd fyri SEV stýrið til góðkenningar og tey eru heldur ikki løgd inn í fíggjarætlanina, tí tey stinga seg ofta upp við stuttari freist so tað ber ikki til at rokna við teimum í fíggjarætlanini.

Í øðrum tænastufyritøkum er helst ikki vanligt, at slík mál verða løgd fyri nevndina, hvørja ferð viðskiftafólk skulu avgreiðast og tilfar keypast við víðari sølu fyri eyga.

## Óvanlig ætlan gjørdist ein vanlig veiting

Tað er tí siðvenja, at SEV keypir útgerð við víðarisølu til ymisk viðskiftafólk fyri eyga og tað er tí ikki eitt serstakt frávik, at SEV ger tað í sambandi við Vágatunnilin.

Men síðani SEV seinast keypti útgerð til Vágatunnilin er stjórin í SEV blivin ógegnigur í málinum við tað, at hann er blivin nevndarlimur í Vágatunlinum. Og hansara ógegni átti at ført við sær, at hann ikki tók lut í málsviðgerðini.

Hinvegin leggur J. P. Danielsen afturat, at hann hevur skilt, at tað hevur verið upp á tal ímillum stjóran hjá SEV og nevndina í Vágatunlinum, at SEV møguliga skuldi eiga og reka neyðaggregatið móti rokning til Vágatunnilin.

– Um SEV skuldi átt og rikið aggregatið, hevði SEV harvið átikið sær nýggjar veitingarskyldur, sum SEV ikki higartil hevur havt, sigur J. P. Danielsen.

Og eftir at málið hevur verið frammi og umboðsnevnd og stýrið hava sett sevstjóranum fyrispurning um viðurskiftini, verður avtala gjørd tann 7. novembur um at Vágatunlinum skal keypa aggregatið frá SEV.

Men spurningurin um, hvør skal reka tað, er enn ikki avgreiddur.

Skrivstovustjórin í SEV er tískil komin til ta niðurstøðu, at tað var rætt av stýrinum fyri SEV at átala mannagongdina í málinum um neyðaggregatið til Vágatunnilin, tí stjórin átti ikki at havt luttikið í saksviðgerðini hjá SEV av málinum.

Hinvegin heldur hann ikki, at átalan eigur at fevna um tað, at SEV keypti aggregatið fyri Vágatunnilin, tí slík mannagongd hevur verið siðvenja á hesum øki.

Átalan kann heldur ikki fevna um ætlanina um, at SEV skuldi eiga og reka aggregatið, tí endaliga avtalan gjørdist ein vanlig veiting eins og aðrar líknandi veitingar hjá SEV.

Í fjølmiðlum hevur Klæmint Weihe ásannað, at hann hevði gegnistrupulleikar í hesum máli.

## Skulu søkja um hjástørv

Samstundis, sum SEV stýrið hevur viðgjørt gegnistrupulleikarnar, hevur tað eisini umrøtt møguleikarnar hjá leiðslufólkum í SEV at átaka sær álitisstørv onnur álitisstørv afturat SEV.

Samtykt varð, at stjóri og deildarleiðararnir skulu hava loyvi frá stýrinum til at átaka sær hjástørv av ymsum slagi og søkjast skal av nýggjum til SEV stýrið fyri hvørt nýval.

Sí eisini greinina »Klæmint Weihe heldur fram í Norðoyatunlinum«.



# Føroyska umdømið dálkað

**Nýggja umhvørviskanningin gevur útlendingum ta fatan, at føroyingar fara illa um náttúruna, sum vit liva av. Tað heldur føroyski umboðsmaðurin í Keypmannahavn. Stjórin í fiskasøluni Farex ber hinvegin ongan ótta fyri føroyska umdøminum og væntar sær ongar trupulleikar at selja fisk**

UMHVØRVI

Umdømið føroyinga uttanlands er skatt av nýggju umhvørivskanningini, sum Heilsufrøðiliga starvsstova hevur gjørt fyri olju- og umhvørvismálaráðið.

Tað heldur í øllum førum føroyski umboðsmaðurin í Keypmannahavn.

Kanningin vísir, at Føroyar hava triðstørsta útlátið av vakstrarhúsgassum fyri hvønn íbúgva í heiminum. Hon vísir eisini, at tað eru føroysku fiskiskipini, sum dálka mest.

Úrstlit frá kanningini eru umrødd av tíðindastovuni Ritzau og eru sostatt borin víðari út í heim.

## Følsk reklama

Hetta kann vera rættiliga óheppið fyri marknaðarføringina av Føroyum, heldur Trygvi Johansen, leiðari fyri føroysku umboðsstovuna í Keypmannahavn.

– Eg gjørdist bilsin, tá eg hoyrdi úrslitini av hasi kanningini. Vit ímynda okkum vanliga, at umhvørvið í Norðuratlantshøvum er reint, og tí kemur hetta óvart á, sigur hann.

Trygvi Johansen heldur, at úrslitið kann sáa ivi um, hvørt føroyingar hava brúkt falska reklamu, tá vit hava víst okkara andlit úteftir.

– Tann kunning, sum vit geva frá okkum, byggir altíð á, at vit hava eitt reint umhvørvi í Føroyum. Og við hesum boðskapi selja vit bæði fiskavørur og ferðavinnu úti í heimi. Tí virkar hetta rættiliga negativt fyri okkum. Tað er ongin ivi um, at hetta er við til at skaða føroyska umdømið uttanlands og gevur ta fatan, at føroyingar ongi fyrilit hava fyri tí náttúru, sum vit liva av, og bara svína hana til. Tað situr eftir, og tað vóru vit betri fyriuttan, sigur Trygvi Johansen.

## Onki at óttast

Tað eru kortini ikki øll, sum eru so bangin um tølini í umhvørviskanningini.

Rói Egholm, stjóri í fiskasøluni Farex, óttast ikki ta sannroynd, at kanningin verður varpað uttanlands.

– Eg trúgvi ikki, at hetta gevur okkum trupulleikar. Okkara keyparar lesa ikki hagtøl á handan hátt. Teir lesa seg fram til, hvussu vit dálka í mun til framleiðsluna, og ikki í mun til hvussu nógv fólk búgva í Føroyum, sigur Rói Egholm.

Hann tekur undir við Olaf Olsen, reiðara, sum í blaðnum í gjár gjørdi vart við, at føroyingar hava stóra orku á sjónum og helst hava flest skip fyri hvønn íbúgva í heiminum. Júst skipini telja mest í kanningini og standa fyri 32 prosentum av útlátinum av koltvíiltu. Sostatt verður dálkingin fyri hvønn íbúgva ovurstór.

– Nógvir av okkara kundum hava eisini verið í Føroyum, so teir vita, at vit hava reinari luft enn stórbýirnir. Okkara keyparar fara óivað at spyrja eitt sindur nærri, men so kunnu vit upplýsa teimum, hvussu støðan er, og tað skilja teir, sigur Rói Egholm.



*Trygvi Johansen, føroyskur umboðsmaður, óttast, at føroyingar hava brúkt falska reklamu í útlendskum í eygum*




*Seks bilasølur verða sum vant við, og verður Ítróttarhøllin á tremur við nýggjum bilum. Bilasølurnar sum við verða hesaferð eru: Norðbil, Bilasølan v/ Øssur Johannesen, Esmar Simonsen, Eyðbjørn Hansen, Johs. Berg og VR-Bilar*

# Bilastevna í Klaksvík

**Stór bilastevna verður í Klaksvíkar Ítróttarhøll 23. og 24. november**

BILASTEVNA
*Tíðindaskriv*

Leygardagin 23. og sunnudagin 24. november skipar Klaksvíkar Ítróttarfelag fyri stórari bilstevnu í Klaksvíkar Ítróttarhøll.

Seks bilasølur verða sum vant við, og verður Ítróttarhøllin á tremur við nýggjum bilum. Bilasølurnar sum við verða hesaferð eru: Norðbil, Bilasølan v/ Øssur Johannesen, Esmar Simonsen, Eyðbjørn Hansen, Johs. Berg og VR-Bilar.

Norðoyingar taka altíð væl ímóti slíkum stevnum, og hvørt ár eru tað hópin av fólki, sum leitar sær í høllina.

Tey vitjandi kunnu stemma uppá, hvøn bil tey høvdu ynkst sær, og harvið luttaka í einum lutakasti, tá ið stevnan endar. Tann bilurin sum fær mest stemmir, vinnir steyp til ognar.

Fyreikararnir siga í tíðindaskrivi, at stevnan verður opin báðar dagarnar frá kl. 15.00 til 21.00.

Leygardagin kl. 17.00 verður undirhald fyri børnunum í Lognbrá.

# Elttør sett umhvørvisnevnd

**Landsstýrismaðurin í umhvørvismálum sett nevnd at kanna burturkast viðurskifti**

BURTURKAST
*Heri á Rógvi*

Eyðun Elttør, landsstýrismaður í umhvørvismálum, hevur sett nevnd at gera tilmæli um, hvussu trupulleikin við vaksandi nøgdum av burturkasti frá húsarhaldum og virkjum kann verða loystur.

– Stóru nøgdirnar av burturkasti hava umhvørvisligar og fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Til tess at bøta um trupulleikarnar er neyðugt við samskipaðum tiltøkum, har bæði borgarar, kommunur og land taka lut, skrivarð landsstýrismaðurin í tíðindaskrivi.

Arbeiðssetningurin hjá nevndini er m.a.:

- at greina ábyrgdarbýtið millum land og kommunur á burturkastøkinum
- at meta um víðkaðar samstarvsmøguleikar millum verandi brennistøðir
- at kanna ymiskar møguleikar fyri at nýta umhvørvisgjøld

Limirnir í nevndini eru:
Herálvur Joensen, formaður
Oljumálaráðið
Atli Leo
Fíggjarmálaráðið
Hilmar Høgenni
Løgmálaráðið
Jógvan Krosslá
Føroya Kommunusamskipan
Jan Christiansen
Føroya Kommunusamskipan
Finngerð Vang
Føroya Kommunufelag
Jóanis Nielsen
Føroya Kommunufelag

Ætlandi verður nevndin liðug við arbeiðið á vári 2003.